## Tungmálmsjól í Keypmannahavn



Hósmorgunin kl. 9.00 byrjaði sølan av atgongumerkjum til eina konsert, sum kann fáa fólk við alsk til gamlan rokk og tungmálm at sleva. Talan er um einki minnið enn eina Tungmálms jólakonsert 3. desember við Dio, Uriah Heep og Asia.

Konsertin verður í KB-Høllini í Keypmannahavn, og lítið er at ivast í, at fleiri føroysk andlit verða millum áskoðararnar. Atgongumerkini fáast á www.billetnet.dk.

Dio, við fornøvnunum Ronnie James, hevur bæði sum einstaklingur og í legendarisku bólkunum Black Sabbath og Rainbow vunnið nógv tungmálmshjørtu, men eisini teir báðir gomlu superrokkbólkarnir Uriah Heep og Asia boða frá góðum hørðum rokki.

**nud**

## Skúlabørnini renna í dag

**Føroya Ítróttalærarafelag bjóðar aftur í ár skúlunum at vera við til ta árligu skúlarenningina**

SKÚLARENNING

Fyrstu ferð skipað varð fyri Norðurlendskari skúlarenning var í 1983, og er hetta sostatt 22. árið at runnið verður.

Flestu av hinum norðurlondum hava umskipað dagin soleiðis, at pláss eisini er fyri øðrum ítróttavirksemi. Føroyar og Ísland hava tó hildið fast um renningina.

Ítróttalærarafelagið hevur í ár gjørt av, at runnið verður nú í dag, fríggjadagin 7. oktober. Tað stendur tó skúlunum frítt fyri at renna annan dag enn tann ásetta. Sigast skal, at fleiri skúlar longu hava runnið.

Vit vita ikki, hvussu nógvir kilometrar føroysku skúlanæmingarnir leggja eftir seg henda dagin, men í fjør vóru fleiri enn 7000 renniprógv send skúlunum. Siga vit, at miðalnæmingurin rennur um 7 km., runnu føroysku børnini uml. 40.000 km tilsamans.

MBM hevur øll árini stuðlað tiltakinum.

Nýtt prógv er prentað, og fáa flestu næmingar hetta til minnis um dagin, sigur Tórfinn Højgaard vegna Føroya Ítróttarlærarafelag.

## Altjóðagerðin – avbjóðing ella møguleikar

**Yvirskipaða evnið á altjóða vinnu- og mentanarstevnuni Faroexpo 2005 verður »Altjóðagerðin – avbjóðing og møguleikar«. Stevnan verður í døgunum 25. - 27. oktober**

VINNULÍV

Altjóða vinnu- og mentanarstevnan Faroexpo 2005 verður hildin í Runavík í døgunum 25. til 27. oktober 2005. Yvirskipaða evnið á vinnustevnini er: »Altjóðagerðin - avbjóðingar og møguleikar«. Fokus verður á møguleikar og avbjóðingar hjá føroyskum fyritøkum og stovnum í altjóðagerðini og á komandi føroyskan aktivitet innan oljuvinnuna.

Fyrrapartin tann 25. til 27. oktober er sonevnt partneriat (fyritøkur hittast á skipaðum fundum) í ítrottarhøllini í Runavík fyri luttakarar. Seinnapartin 25. og 26. oktober, vera Almennir Fyrilestrar í Ráðstevnusalinum í Skálabotni, sum í hesum sambandi er leigaður frá Kelduni.

Fyrilestrar 25. oktober:
13:30 - 14:30
Útflutningsfígging - Føroya Sparikassi
14:30 - 15:30
Debitortrygging og Faktoring - Tryggingarfelagið Føroyar
15:30 - 16:30
Uppkeyp sum ein háttur at koma uttanlands - Kaupting

Fyrilestrar 26. oktober:
13:30 - 14:30
Managing for Global Growth - Dansk Industri
14:30 - 15:30
Oljuvinnan - avbjóðing og veitarakrøv - Statoil
15:30 - 16.30
Møguleikar við virðisbrævamarknaði Føroya - VMF

Kaffisteðgur við undirhaldandi tónleiki verður eisini.

Nágreinilig kunning um Faroexpo 2005 er at finna á heimasíðuni www.faroexpo.fo, sigur Símun Hammer á Virkisráðgevingí Saltangará.

# Brúðarkjólar kunnu hjálpa í Kenya og Rwanda

**Malena og Jens Meitilberg, sum arbeiða við trúboðaravirksemi í Kenya, eru farin at savna saman brúðarkjólar, sum verða leigaðir út til tess at fíggja virksemi hjá kirkju og barnaheimi í Kenya og Rwanda**

HJÁLP
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*



*Familjan Meitilberg í Kenya: – Okkara ætlan er, at barnaheimið New Life House Ministry eisini fer at royna at leiga brúðarkjólar út, siga Malena og Jens Meitilberg*

Hava vit í Føroyum møguleika at hjálpa fátøkum í Afrika? Ja, føroyingar hava altíð verið fúsir til at hjálpa øðrum, og nú er aftur eitt gott høvi til at hjálpa, og hesaferð er tað bert eittans plagg sum tørvur er á: Brúðarkjólar.

– Vit høvdu verið sera fegin at fingið brúktar brúðarkjólar. Óiva liggja nógvir runt á loftum og í kjallarum og samla støv, siga Malena og Jens Meitilberg úr Kenja.

Tey siga, at í Rwanda, har tey vitjaðu í september, eru samkomurnar sera fátækar. Ikki er ráð at løna prestinum, og hevur kona prestin fingið hugskotið at fara at leiga brúðarkjólar út fyri at kirkjan kann fáa onkra lítla inntøku og yvirliva.

Eisini til raksturin á barnaheiminum, sum Malena og Jens Meitilberg arbeiða við í Kenya, er tørvur peningi fyri framhaldandi at kunna hjálpa børnunum víðari.

– Okkara ætlan er, at barnaheimið New Life House Ministry eisini fer at royna at leiga brúðarkjólar út, siga tey bæði úr Kenya.

– Eigur onkur ein brúðarkjóla? Og vilja tit hjálpa og gleða fátøk í Afrika, so kunnu tit geva hann sum tykkara hjálp, siga tey.

Í november koma fólk út at vitja tey, og vónandi fáa tey onkran við tá, siga tey bæði.

Um fólk eru áhugað í hesum, ber til at seta seg í samband við Conny Háskor, Slættanesgøta 3 Tórshavn, tlf. 313446 ella arb. 317633/217633.

# Kristian og Sharon á Sóloynni

**Kristian Blak og Sharon Weiss eru tær næstu tríggjar vikurnar í Bolivia, har tey skulu luttaka á einum seminari á Sóloynni, halda skeið í verðinstónleiki á konservatoriinum í La Paz, og annars kunna seg um tónleik og aðra mentan á staðnum**

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*



*Sharon og Kristian skulu hava eina framløgu á einum tónleikaseminari á Sóloynni, og seinnið verður skipað fyri konsert í einum dali á oynni, har Kristian og Sharon m.a. skulu spæla*

Hósdagin fóru Kristian Blak og Sharon Weiss úr Føroyum til Bolivia. Sambandið við Bolivia er komið í lag í felagsskapinum International Society of Contemporary Music. Føroyar fóru upp í hendan felagskap fyri einum góðum ári síðan. Kristian hevur umboðað Felagið Føroysk Tónaskøld á fundum í Sveits og í Kroatia. Á hesum fundum eru nógv sambond skapt, og hetta hevur millum annað havt við sær, at Heðin Ziska Davidsen í løtuni er í Gottlandi og arbeiðir við tónleiki, og so at Kristian og Sharon eru boðin til Bolivia.

### Konsert á halgasta Inka staðnum

Fyrstu dagarnir tey eru í Bolivia, vera tey á Sóloynni. Oyggin liggur mitt í Titicaca vatninum, ið liggur 3,810 km yvir havsins yvirflatu í Andesfjøllunum, vatnið liggur á sjálvum markinum millum Peru á vestaru síðu og Bolivia á eystaru síðu. Vatnið er 8300 km2 stórt. Í fornari tíð var Sóloyggin, tann halgasti av Inka halgidómunum.

Sharon og Kristian skulu hava eina framløgu á einum tónleikaseminari á Sóloynni, og seinnið verður skipað fyri konsert í einum dali á oynni, har Kristian og Sharon m.a. skulu spæla. Nógv fólk úr nógvum londum luttaka á seminarinum, m.a. úr New Zealandi, Gottlandi, Fraklandi og Bali.Kristian sigur seg vóna, at møguleiki verður at spæla saman við nøkrum av hesum spennandi gestum.

### Uppliva mentanina

Vikuna eftir skal Kristian halda skeið í verðins tónleiki á konservatoriuminum í La Paz. Hetta verður eitt slag av tónleikaverkstaði har dugnalig tónleikalesandi, ið til dagligt arbeiða við boliviskum fólkatónleiki luttaka. Kristian sigur seg gleða seg til at sleppa at spæla saman við hesum fólkum.

Vikuna eftir ætla Kristian og Sharon at kanna boliviska mentanina og tónleikapallin, og møguliga arbeiða víðari saman við onkrum av teimum, sum tey hava hitt fyrstu vikurnar.